# Varðin, Framherji og Samherji vilja leiga

**LEIGUSÁTTMÁLI** - Tað eru so nógv áhugamál í einum slíkum búgvi, og tí tori eg einki at siga ella at trúgva, fyrr enn endaligur sáttmáli er undirskrivaður, og øll viðurskifti eru greið, sigur Anfinn Olsen, reiðari hjá Framherja

**... vit vita, hvussu tað gekst seinast, og tí tori eg einki at siga, fyrr enn alt er liðugt...**
ANFINN OLSEN

Vilmund Jacobsen

Anfinn Olsen, reiðari hjá Framherja, váttar, at tað eru somu partar, sum fyrr í heyst samráddust um at yvirtaka partabrøvini í Faroe Seafood, sum nú eru í samráðingum við búgvið eftir felagið um at leiga seks ísfiskatrolarar og nøkur virkir, sum eru í trotabúnum.



*- Vit eru umleið somu partar, sum fyrr í heyst vóru áhugaðir í at keypa partabrøvini í Faroe Seafood, sigur Anfinn Olsen, reiðari, sum váttar, at teir eru "aktørurin", ið er umrøddur sum leigari av skipum og virkjum*



*Nú er greitt, at "aktørurin", sum nevndur hevur verið í sambandi við leigu av skipum og virkjum hjá Faroe Seafood, eru somu feløg, sum vóru áhugaði í at keypa partabrøvini í Faroe Seafood*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Men vit vita, hvussu tað gekst seinast, og tí tori eg einki at siga, fyrr enn alt er liðugt.

Reiðarin vísir á, at tá talan er um eitt trotabúgv, sum Faroe Seafood og Faroe Fish II eru, er hetta ikki sum at samráðast undir vanligum handilsligum umstøðum.

- Tað eru so nógv áhugamál í einum slíkum búgvi, og tí tori eg einki at siga ella at trúgva, fyrr enn endaligur sáttmáli er undirskrivaður, og øll viðurskifti eru greið, sigur hann.

### Einki er liðugt

Anfinn Olsen heldur seg tí orðini um, at einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt.

- Men vit hava nú í eina tíð arbeitt við hesi ætlan, sum vit vóna røkkur á mál.

Spurdur, um talan verður um leigu av skipum og nøkrum virkjum við forkeypsrætti, sigur reiðarin, at tað dugir hann í løtuni slett ikki at meta um.

- Vit eru umleið somu partar, sum fyrr í heyst vóru áhugaðir í at keypa partabrøvini í Faroe Seafood. Nú mugu vit so síggja, hvussu langt vit náa í hesum samráðingum um leigu av skipunum í Faroe Fish II og nøkrum virkjum, sigur Anfinn Olsen, reiðari.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Fýra trolarar landa í morgin

**FISKIVINNA** Hóast fleiri av skipunum, sum plagdu at landa í Saltangará, liggja í løtuni, verður tó fitt av virksemi á landingarmiðstøðini Kongshavn í morgin

Vilmund Jacobsen

Landingarmiðstøðin Kongshavn fer at landa fýra ísfiskatrolarar í morgin.

Skipini eru partrolararnir, Jaspis og Ametyst og Polarhav og Stjørnan.

Sum skilst, hevur upsaveiðan hjá skipunum ikki verið lakari hendan túrin, enn hon annars hevur verið í seinastuni.

Greitt er ikki, hvat skipini hava, tá tey koma inn at landa í morgin, men fríggjakvøldið høvdu Jaspis ogh Ametyst umleið 600 kassar – og í gjár høvdu Polarhav og Stjørnan umleið 250 kør tilsamans.

Sosialurin fer at venda aftur til landingartølini, tá skipini hava lagt veiðin upp.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Partrolararnir, Jaspis og Ametyst, sum eru í felagnum Faroe Fish I, landa í Saltangará í morgin. Tað gera Polarhav og Stjørnan eisini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*